FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# Býráðið

**Dagfesting:** 29.02.2024 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Ólavur Larsen

Varalimir: Bergtóra Cederiusdóttir fyri Sonni á Horni, Sheila S. Sóldal fyri David Andreasen og Kristian Martin Petersen fyri Magna Jøkladal

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 9/24 | 21/00347-67 | Broyting av byggisamtykt við Gjógvaráveg |
| 10/24 | 21/00620-48 | Frávera vegna sjúku og andlát - uppskot um broyting í starvsfólkahándbókini |
| 11/24 | 24/00023-7 | Umsókn frá Petur Larsen P/F - uppfylling við gróti við bygningin hjá Petur Larsen P/F |
| 12/24 | 24/00033-1 | Sundurbýti millum matr.nr. 871e og 871bc |
| 13/24 | 24/00100-1 | Marknaumskipan við matr.nr. 2b og 569 |
| **Til kunning** | | |
| | | |

1

**Til støðutakan**

## 9/24
## 21/00347-67 Broyting av byggisamtykt við Gjógvaráveg

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 21.02.2024 | 2/24 |
| 2 Býráðið | 29.02.2024 | 9/24 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Málið er broyting av byggisamtykt fyri øki omanfyri Gjóagvaráveg, oman móti sandinum.<br>Málið er viðgjørt í nevndini fyrr, men mátti leggjast fram aftur av tí at ein dagur manglaði í tíðini sum stóð í kunngerðini.<br>Málið hevur ligið frammi og 9 mótmæli komu inn. Hesi mótmæli skal tekniska nevnd viðgerða og taka støðu til mótmælini. Eina mótmælið kom inn 22.1.2024 eftir at freistin var farin, men støða kann takast til um hetta skal við í viðgerðina.<br>Felags fyri mótmælini er, at tey ynskja at varðveita og víðka økið, sum frílendi, tí tað liggur beint omanfyri sandin, sum er eitt fríløtuaktiv.<br>Alternativ uppskot er at nýta økið til betri atkomu og ymiskt fríløtuvirksemi og víst verður til millum annað til faldaran «Ferðavinna og trivnaður» og orðingar úr byggisamtyktini frá 2018 um, at «Arbeitt verður fram ímóti at fáa øll neyst og úthús framvið sandinum, niðanfyri Gjógvaráveg, burtur». | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Ynski frá borgara um at sleppa at byggja á einum øki sum er lagt út til Miðstaðarendamál og Frílendi.<br>Eftir ynski frá borgara, hevur býráðið tikið støðu til at broyta byggisamtyktina so alt hetta øki verður Bústaðarøki. Talan er um matr.nr. 622a, 701 og 702.<br>Eftir at byggisamtyktin er broytt, ber til at leggja matr.nr. 622a. 701 og 702 saman sum eigarin ætlar. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt Byggisamtykt og BK 17<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |

2

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | **Upprunauppskot.**<br>Tekniski leiðarin mælir teknisku nevnd til at viðgerða mótmælini sum eru komin. Og síðan taka støðu til broytingina.<br><br>**Broytingaruppskot frá Ólavi Larsen, Listi Á:**<br><br>Orsøk til broytingaruppksot:<br><br>Eg havi sjálvur tikið undir við hesum málinum í Teknisku nevnd, men eftir nærri umhugsan haldi eg, at tað er skilagott at bíða við hesi avgerð, inntil arkitektarnir sum í løtuni arbeiða uppá miðbýarætlan, koma við sínum uppskotum um okkara miðbý. Um vit gera hesar broytingar nú, so leggja vit upp til, at hesin parturin av miðbýnum ikki skal broytast. Eg havi, í fleiri umførum, ikki tikið undir við smærri málum rundanum miðbýin, tí vit eru í gongd við miðbýarætlanina. Tað kann ikki skaða stórliga, um vit útseta hetta málið í nakrar mánaðir, fyri síðani at taka ein avgerð, har fakkunnleikin hevur verið innyvir okkara miðbý.<br><br>Broytingaruppskot:<br>Eg skjóti upp, at vit seta hetta málið á pausu, inntil kappingin um miðbýarætlanina er komin á mál, seinni í ár. | | |
| Dagf | 7.2.2024 | | |



**<u>Tekniska nevnd 21. februar 2024:</u>**

Tekniska nevnd hevur viðgjørt mótmælini frá borgarunum til broytingarnar í byggisamtyktini. Mótmælini ganga í høvuðsheitum út uppá:

- at varðveita og víðka frílendi til fríløtuendamál.
- at tryggja parkeringsviðurskifti og atgongd til sandin og sjóvarmála.
- At útsýni frá mørkini verður skert.
- Ein av mótmælarunum setur spurnartekin við fyrisitingina av málinum, tí býráðspolitikari í síni tíð hevur selt økið.

Hesum seinasta tekur tekniska nevnd ikki undir við og hetta er heldur ikki relevant tí viðkomandi býráðspolitikari ikki luttekur á fundinum 29.02.2024.

Tekniska nevnd er av tí áskoðan, at sandurin og økið fram við Gjógvarávegnum er eitt gott fríløtuaktiv fyri Fuglafjørð.

Hinvegin skal altíð ein javnvág finnast ímillum bústaðir, fríløtuøki, miðstaðarøki og vinnuøki v.m. Í hesum førum er talan um bara góðar 400 $m^2$ av ávikavist økið til miðstaðarøki og økið

til frílendi, sum skotið verður upp at broyta til bústaðarøki. Við uppskotnu broyting verður byggistigið broytt frá 0,8 fyri miðstaðarøki(matr. nr. 622a) til umleið 0,4, sum er galdandi fyri bústaðarøki. Sum nú er kann byggjast á matr. nr. 622a til miðstaðarendamál við byggistignum 0,8.
Tekniska nevnd metir, at nógvir atkomumøguleikar eru til sandin nærhendis t.d. frá torginum við Mentanarhúsið og longur yviri á Gjógvarávegnum. Eisini eru lutfalsliga stórt frílendi longur yvir á Gjógvarávegnum.
Kommunan eigur ikki omanfyrinevndu matrikul.
Tí er niðurstøðan hjá teknisku nevnd at hon ikki tekur undir við mótmælunum og mælir hervið býráðnum til at samtykkja broytingina í byggisamtyktini.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Býráðið atkvøddi fyrst um broytingaruppskotið frá Ólavi Larsen, býráðslimi.
Fimm atkvøddu fyri Gudny Vang, Ólavur Larsen, Bergtóra Cedriusdóttir, Sheila S. Sóldal og Kristian Martin Petersen. Ímóti atkvøddu Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Edva Jacobsen og Eivin Breiðaskarð. Uppskoti hjá Ólavi Larsen er tí samtykt og upprunauppskotið fellur tí burtur.

## 10/24
## 21/00620-48 Frávera vegna sjúku og andlát - uppskot um broyting í starvsfólkahándbókini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.01.2024 | 1/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.02.2024 | 11/24 |
| 3 Býráðið | 29.02.2024 | 10/24 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | **26. februar 2024**<br>Uppskotið til broyting av vegleiðingini hevur verið til hoyringar hjá leiðslum og álitisfólkum. Tá ið hoyringsfreistin gekk út tann 6. februar 2024, var eitt hoyringsvar komið inn. Viðmerkingarnar frá hoyringsvarinum eru gjøgnumgingnar, og tær broytingar sum vit eru samd um, eru tiknar við í vegleiðingina. Sum nú verður send til fíggjarnevndina at góðkenningar. Hoyringarsvar og nýtt uppskot til vegleiðing eru løgd við sum dokument.<br><br>**22. januar 2024**<br>Tørvur er á at skerpa vegleiðingina um fráveru vegna sjúku og andlát. Tað er serliga tvey brot sum skulu greinast betur.<br><br>Undir evninum «Fráveru vegna sjúku hjá barni» er vegleiðingin greið. Ásetingin um frí við løn vegna sjúkt barn er at finna í sáttmálunum, og sáttmálaásetingarnar eru galdandi hesum viðvíkjandi.<br><br>Vegleiðingin greinar eisini, at ásetingarnar ikki fevna um serlæknavitjanir, sertannlæknavitjanir og líknandi, ið ikki er brádlig ákomin sjúka.<br><br>Seinasta brot í vegleiðingini um «fráveru vegna sjúku hjá barni» ger, at vegleiðingin blívur ógreið. Her stendur, at snýr tað seg um álvarsliga sjúku kann hettar verða tikið upp í hvørjum einstøkum føri við avvarandi deildarleiðara og kommunustjóra.<br><br>Hendan orðingin letur upp fyri fleiri avbjóðingum, tí nær er talan um álvarsliga sjúku? Og hvussu leingi heldur Fuglafjarðar kommuna, at starvsfólk skulu lønast fyri at vera heima við álvarsliga sjúkum barnið? Talan kann saktans blíva um langtíðar sjúkrafráveru, sum ikki eru heimilaðar í sáttmálunum við |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">fakfeløgini. Tí verður skotið upp, at hettar brotið verður strika úr starvsfólkahondbókini.<br><br>Undir evninum «frávera vegna álvarsliga sjúku hjá hjúnafelaga, barni ella øðrum næstringum» bleiv í vegleiðingini lati upp fyri, at starvsfólk kundu fáa frí við løn í tveir dagar. Orðingin í hondbókini er avbjóðandi, og aftur her er ógreitt, hvat talan er um. Nær er talan um álvarsliga sjúku? Hvussu ofta kann eitt starvsfólk fáa løn, tí ein av næstringunum er álvarsliga sjúkur? Spurningurin stingur seg upp, tí vit t.d. hava starvsfólk við gomlum foreldrum, har ellisárin gera, at tey afturvendandi verða innløgd á sjúkrahús. Talan kann vera um álvarsliga sjúku hvørja ferð tey verða innløgd, og tað er sjálvandi gleðiligt, at tey koma seg og koma heim aftur, men í summum førum kann tað verða talan um nógvar frídagar við løn pr. ár.<br><br>Av tí at sáttmálaásetingarnar ikki geva rætt til fri við løn vegna sjúku hjá nærstandandi annað enn tað sum er lýst undir sjúku hjá barni, er ynskiligt, at vegleiðingin verður broytt, og at kommunan í staðin fylgir teimum rættindum sum eru givin í sáttmálaásetingunum.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Ynski frá stovnsleiðarum um greiðari vegleiðing viðv. Rættindi til løn undir sjúku hjá avvarðandi.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>Vegleiðing frá starvsfólkahóndbókini hjá Fuglafjarðar Kommunu «Frávera vegna sjúku og andlát»<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>• «frávera vegna sjúku og andlát» uppskot til broyting</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td></td><td>ja</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Ja</td><td></td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">26. februar<br>Mælt verður til, at fíggjarnevndin tekur undir við teimum broytingum sum eru gjørdar í vegleiðingini um “fráveru vegna sjúku og andlát”.<br><br>22. januar 2024<br>Mælt verður til, at fíggjarnevndin gjøgnumgongur vegleiðingina um «Fráveru vegna sjúku og andlát» og tekur støðu til:</td></tr>
</table>



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | 1) at strika brotið um at rætturin til frí við løn tá ið tað snýr seg um álvarsliga sjúku hjá øðrum enn børnum kann takast upp í hvørjum einstøkum føri.<br>2) at strika brotið um, at starvsfólk kunnu fáa frí við løn í tveir dagar tá ið talan er um álvarsliga sjúku hjá hjúnafelaga, barni ella øðrum næstringum.<br><br>Og at broytingarnar verða sendar til hoyringar hjá leiðslu og álitisfólkum, áðrenn endalig niðurstøða verður gjørd. |
| Dagf | 12. januar 2024 |

**Fíggjarnevndin 22. januar 2024:**
Fíggjarnevdin tekur undir við, at uppskotið til broytingar í starvsfólkahondbókini verður sent til hoyringar hjá leiðslu- og álitisumboðum.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2024:**
Fíggjarnevndin samtykti vegleiðing til starvsfólkahondbókina.

7

**Býráðið 29. februar 2024:**
Býráðið tók einmælt undir við broytingini í starvsfólkahandbókini.

## 11/24
## 24/00023-7 Umsókn frá Petur Larsen P/F - uppfylling við gróti við bygningin hjá Petur Larsen P/F

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 13.02.2024 | 9/24 |
| 2 Býráðið | 29.02.2024 | 11/24 |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevnd | | |
| Stutt lýsing av málinum | Petur Larsen P/f hevur hin 08. juni 2011 fingið játtandi svar til umsókn um útfylling við gróti fyri at betra um innkoyringsmøguleikar til verkstaðið, so atkoman við bussum og lastbilum gerst betur, sí skjal 24_00023-4.<br>Talan er um eitt økið sum er uml. 25m$^2$, sí kortskjal frá kortal uppfylling. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Fyrispurningur frá Rógva Róin, stjóra, um útfyllingin kann gerast ella ikki. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Skjal: 24_00023-4<br>• Skjal: kortskjal frá kortal uppfylling<br>• Skjal: 24_00023-5 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | x | |
| | Umsitingarligar | x | |
| Tilmæli | Tekniski leiðari mælir vinnu- og havnanevndina til at viðgera málið av nýggjum, og taka avgerð um Fuglafjarðar kommuna loyvir útfyllingina. | | |
| Dagf | 22.01.2024 | | |

8

**Vinnu- og havnanevndin 13. februar 2024:**
Vinnu- og havnamevdin mælir til at loyva útfyllingina, men at tekningin verður tillaga og málið lagt fyri býráðið tí talan er um lítið frávik í byggisamtyktini.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Ólavur Larsen boðaði frá at hann varð ógegnigur og fór av fundinum. Býráðið atkvøddi um málið og samtykti málið við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 12/24
## 24/00033-1 Sundurbýti millum matr.nr. 871e og 871bc

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 13.02.2024 | 10/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.01.2024 | 5/24 |
| 3 Býráðið | 29.02.2024 | 12/24 |

### Tilráðing

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevnd og fíggjarnevnd | | |
| Stutt lýsing av málinum | Sundurbýti millum matrikul 871e, 871bb og 871bc | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Grunda á, at linjuføring av nýggjum atkomuvegi til grótbrotið verður broytt, verður neyðugt, at fáa fatur á uml. 2076 m2 frá matr. nr. 871bc. Víst verður til mál 23/00559 um vegaføring. Tekniska deild mælir til, at gera gerðabýti við eigaran av matr.nr. 871bc. Gerabýti fer ímillum matr.nr. 871e og 871bc, somuleiðis letur kommunan 871bb í býti. Eigarin av 871bc skal gjald munin millum givnu og tiknu m2. Talan er um 384m2.<br>Eigarin av matr.nr. 871bc hevur játta hesum býti. | | |
| Grundarlag | • Tekning av sundurbýtinum (99)1.00<br>• Tekning av nýggjum atkomuvegi til grótbrotið (99)1.01<br>• Víst verður til máls nr. 23/00559 - vegaføring til grótbrotið | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | x | |
| | Umsitingarligar | x | |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til sundurbýti millum eigarnar. | | |
| Dagf | 17.01.2024 | | |



**Vinnu- og havnanevndin 13. februar 2024:**
Vinnu- og Havnanevndin tekur undir við tilmælinum frá tekniska leiðaranum um sundurbýti millum eigarnar.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum um sundurbýti millum matriklini 871e, 871bb og 871bc.

**13/24**
**24/00100-1 marknaumskipan við matr.nr. 2b og 569**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 21.02.2024 | 6/24 |
| 2 Býráðið | 29.02.2024 | 13/24 |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Tekniskunevnd | | |
| Stutt lýsing av málinum | Marknaumskipan við matr. nr 2b og 569 | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Eigarin av matr. nr 569 ynskir at kommuna keypir part av sínum matrikli ið longu er gjør sum vegaføring.<br>Tekniska deild mælir til at eisini at fremja marknaumskipan við eigaran av matr.nr. 2b grunda á, at hettar er eisini í somu vegaføring. | | |
| Grundarlag | • Kort yvir marknaumskipan við matr.nr. 2b<br>• Kort yvir marknaumskipan við matr.nr. 569 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | X | |
| | Umsitingarligar | X | |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at fremja marknaumskipan við eigarnar. | | |
| Dagf | 19.02.2024 | | |



**Tekniska nevnd 21. februar 2024:**
Tekniska nevnd tekur undir við tilmælinum frá tekniska leiðaranum um markaumskipan ímillum kommununa og matr. nr. 2b og matr. nr. 569.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Borgarstórin tí málið av dagsskrá og beindi tað aftur til umsitingina tí tað ikki er búgvið til støðutakan.

Fundurin lokin kl. 20.10

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Kristian Martin Petersen

Ólavur Larsen

Bergtóa Cedriusdóttir

Sheila S. Sóldal



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo